# Jógvan við Keldu eigur at fara frá

**– Eg bleiv frákoyrdur fyri onki. Eg ivaðist ikki í, at Jógvan við Keldu fór at verða koyrdur úr sessinum aftan á viðmerkingarnar í Degi og Viku fríggjakvøldið, sigur Johan Dahl, sum aftan á tríggjar vikur í landsstýrissessi noyddist frá, tí løgmaður vildi hava arbeiðsfrið**



*_ Jógvan við Keldu sleppur at gera slíkar bummarar bæði tvær og tríggjar ferðir og helst fleiri ferðir afturat, uttan at tað fær nakrar sum helst avleiðingar. Tað er ov veikt, sigur Johan Dahl, tingmaður og frákoyrdur landsstýrismaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Uppsagdur landsstýrismaður**
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Løgmaður hevur góðtikið umberingina frá Jógvani við Keldu, eftir at landsstýrismaðurin í Degi og Viku fríggjakvøldið segði seg undrast á, hví hjúnini Rapa yvirhøvur vóru sloppin inn á lærarskúlan.

> *»Løgmaður er opinbart øgiliga lættur í sínari viging. Landsstýrismenn verða eftir øllum at døma viðgjørdir ymiskt«*
> *- Johan Dahl*

Løgmaður segði við Dag og Viku mánakvøldið, at tað er nú einaferð soleiðis, at øll kunnu vera mismælt, og øll kunnu gera ein feil.

– Er tað so, at man fer framaftur og tekur tað í seg aftur ella biður um eina umbering fyri tað, sum mann hevur gjørt, so haldi eg, at man eigur at virða tað, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard og formaður í Javnaðarflokkinum, sum harvið hevur avgreitt málið viðvíkjandi viðmerkingunum hjá Jógvani við Keldu um Rapa-hjúnini.

Eisini í Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum er málið avgreitt. Jørgen Niclasen úr Fólkaflokkinum segði við Dag og Viku mánakvøldið, at viðmerkingarnar hjá Jógvani við Keldu um Rapa-hjúnini ikki fáa nakrar avleiðingar innanfloks, eftir at landsstýrismaðurin hevur biðið um umbering.

Sambdsformaðurin Kaj Leo Johannesen sigur somuleiðis, at Sambandsflokkurin hevur góðtikið umberingina hjá Jógvani við Keldu og harvið avgreitt málið.

Tískil hava allir oddafiskarnir í samgonguni góðtikið umberingina og avgreitt málið viðvíkjandi Jógvani við Keldu.

> *»Ein danskur ministari hevði púra vist farið frá fyri slíkar viðmerkingar sum tær hjá Jógvani við Keldu«*
> *- Johan Dahl*

### Hann eigur at fara frá

Men hjá øðrum er hetta málið ikki avgreitt. Johan Dahl er tingmaður hjá Sambandsflokkinum og harvið partur av parlamentariska grundarlagnum hjá løgmanni og Jógvani við Keldu og øðrum í Føroya Landsstýri. Johan Dahl var landsstýrismaður fyri hálvum øðrum ári síðani, men hann helt ikki leingi í landsstýrinum hjá Jóannesi Eidesgaard, tí aftan á tríggjar vikur var hann koyrdur frá.

– Eg bleiv frákoyrdur fyri onki. Eg ivaðist ikki í, at Jógvan við Keldu fór at verða koyrdur úr sessinum aftan á viðmerkingarnar í Degi og Viku fríggjakvøldið. Hatta er ov veikt at bara góðtaka umberingina, sigur Johan Dahl, tingmaður og frákoyrdur landsstýrismaður.

– Løgmaður er opinbart øgiliga lættur í sínari viging. Landsstýrismenn verða eftir øllum at døma viðgjørdir ymiskt, sigur Johan Dahl.

Tingmaðurin sigur, at um ein landsstýrismaður hevur flokkin aftan fyri seg, so gongur alt.

– Jógvan við Keldu sleppur at gera slíkar bummarar bæði tvær og tríggjar ferðir og helst fleiri ferðir afturat, uttan at tað fær nakrar sum helst avleiðingar. Tað er ov veikt. Ein danskur ministari hevði púra vist farið frá fyri slíkar viðmerkingar sum tær hjá Jógvani við Keldu, sigur Johan Dahl, tingmaður.

---

Sambandsformaðurin:

# Umberingin góðtikin

*Tað er rós vert, at Jógvan við Keldu umber seg fyri Rapa-hjúnunum, sigur Kaj Leo Johannesen. Jógvan við Keldu undraðist í Degi og Viku fríggjakvøldið á, hví hjúnini yvirhøvur vóru sloppin inn á lærarskúlan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Um vikuskiftið segði Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, at viðmerkingarnar hjá Jógvani við Keldu kundu ikki góðtakast. Mánadagin kom Jógvan við Keldu við einari treytaleysari umbering, og hana kann Sambandsflokkurin góðtaka**

**Umbering frá landsstýrismanni**
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Vit vórðu spurdir, um vit kundu góðtaka eina treytaleysa umbering, og tað søgdu vit gott fyri, sigur Kaj Leo Johannesen.

Løgmaður hevur ábyrgd av sínum landsstýrismonnum og hevði ivaleyst fleiri møguleikar í hesum málinum. Annar møguleikin var, at Jógvan við Keldu fór frá sum landsstýrismaður. Hetta gjørdist ikki veruleiki, tí Jógvan við Keldu er sum kunnugt komin við treytaleysari umbering til hjúnini Rapa, og hana hevur løgmaður góðtikið. Kaj Leo Johannesen heldur, at løgmaður eftir umstøðunum gjørdi rætt.

### Ov ógvusligt at koyra mannin heim

– Undir verandi umstøðum haldi eg, at løgmaður gjørdi rætt. At ein landsstýrismaður úttalar seg skeivt til fjølmiðlarnar og verður koyrdur heim er ov ógvusligt, sigur Kaj Leo Johannesen. Johan Dahl hjá Sambandsflokkinum noyddist í fjør at fara frá sum landsstýrismaður. Nógvar ákoyringar vóru, og at enda fór Johan Dahl, men hann fór ikki frá vegna skeivar ella óhepnar viðmerkingar til fjølmiðlarnar. Kaj Leo Johannesen heldur ikki, at hesi bæði málini kunnu samanberast.

### Onki við Johan Dahl at gera

– Hetta hevur onki við Johan Dahl at gera. Eg vil slett ikki samanbera hesi bæði tingini. Vit góðtaka umberingina hjá Jógvani við Keldu. Tað fer onki av manninum, um hann kemur við einari umbering. Heldur hinvegin. Tað er rós vert, at Jógvan við Keldu umberir seg fyri Rapa-hjúnunum, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

### Málið er avgreitt

Kaj Leo Johannesen væntar ikki, at tað koma nógv at slíkum úttalilsum afturat, tá tað kemur til útlendingamál. Sambandsformaðurin heldur, at viðmerkingarnar hava ikki verið smidligar higartil.

Sambandsflokkurin ger tískil ikki meira við málið um Jógvan við Keldu, og um løgmaður hevur eisini avgreitt málið.